**Skeið nr. 2413.10 Mannarættindi og revsirættur í Føroyum**

Námsstig: 10 ECTS.

Kenslustig: Master (ætlað at verða góðskrivað á M.A. í løgfrøði, LL.M., cand. jur. o.l.)

Tíð: Várið 2010. Undirvísing frá 9. apríl 2010. Próvtøka 21. og 22. juni.

Lærarar: *Dr.* Kári á Rógvi *lektari*, Hanna Vang *cand. jur.* og Heðin D. Poulsen *LL.M.*.

**Endamál**: At veita innlit í týdning fyri og ávirkan á revsirætt av mannarættindum, serliga Europeiska Mannarættindasáttmálanum. Tey lesandi skulu fáa nøktandi innlit í revsing og mannarættindi til tess at kunnu eyðmerkja og greina trætur, har hesar rættarreglur fáa týdning í senn og tí bæði møtast og skulu avvigast.

**Evni**: Skeiðið kannar bæði almennar og serstakar spurningar á mótinum millum revsirætt og mannarættindi. Meginreglur sum *legalitetsprinsippið* í § 1 í verandi donsk-føroysku revsilóg og *forboðið móti afturvirki* í grein 7 í EMRS verða viðgjørd. Harumframt verður hugt at tulkingarstíli og venju hjá bæði norðurlendskum dómstólum og Europeiska Mannarættindadómstólinum. Evni sum framsøgufrælsi og trúarfrælsi í samvirkan við revsirætt eru somuleiðis sera týðandi. Skeiðið er serliga viðkomandi, nú ætlanir eru at yvirtaka revsirætt sum føroyskt sermál.

**Undirvísing:** 54 undirvísingartímar. Undirvísingin verður skipað við framløgum frá lærara og gestafyrilesarum – ætlandi dómarum og lærdum úr grannalondum og Føroyum. Eisini verða studentaframløgur.

**Próvtøkuformur:** Skrivlig avrik telja 1/3 av próvtalinum, munnlig próvtøka 2/3. Dømt verður eftir 13-tals stiganum við uttanseturs próvdómara.

**Fortreytir:** Tey lesandi skulu hava akademiska útbúgving á minst grundstigi (bachelor) við nóg mikið av løgfrøði ella javnmettum fakum, t.d. Grundskeiði í lóg ella líknandi.